# Føroyskir whisky-fjepparar fylkjast




**Tað einmælt samtykt, at whiskyfelagið EinMalt hevur stovnandi aðalfund og smakking fríggjakvøldið**

**LÍVSSTÍLUR**
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hava føroyskir whisky-fjepparar fyrireikað áhugafelagið EinMalt fyri føroyingar allastaðni í heiminum.

Fyrireikararnir, sum eru teir tríggir, Dánial Hoydal, Bogi Mouritsen og Andras Olsen, boða frá, at felagið hevur stovnandi aðalfund fríggjakvøldið 31. oktober kl. 19 á Patio í Havn. Samstundis verður felagið eisini stovnað í Keypmannahavn. Fundirnir báðir hava samband við hvønn annan umvegis Skype. Í sambandi við stovnandi aðalfundin verður fyrilestur við danska whisky serfrøðinginum, Leif Kjærgaard, sum eisini skipar fyri whisky smakking.

Fyribilsnevndin fegnast um stóra áhugan, sum fólk longu hava víst felagnum. Eitt nú í sambandi við eitt whisky kvøld, sum var á Patio í summar. Felagið hevur gjørt sær eina heimasíðu www.whisky.fo, har til ber at kjakast um whisky og at finna slóðir um whisky.

Øll kunnu tekna seg sum lim í felagnum fyri 200 krónur árliga, og limaskapur er ein treyt fyri at luttaka í tiltakinum fríggjakvøldið. Kostnaðurin er tá 400 krónur, og tá er limaskapur, fyrilestur og smakking við í prísinum, siga teir tríggir, Dánial Hoydal, Bogi Mouritsen og Andras Olsen.

## VEÐRIÐ




**Veðrið í kvøld**
Landnyrðingur, 9 m/s. Turt, klárt og hitin 5 stig




**Veðrið fríggjadagin**
Útnyrðingur og vestan, 3 til 5 m/s. Turt allan dagin, og hitin 4 stig




**Veðrið leygardagin – Ala Halganna dag**
Fyrrapartin útsynningur, 11 m/s. Regn. Seinnapartin slítur í, 12 m/s av útsynningi, og um kvøldið skýggjað, 9 m/s av vestri og turt. Hitin 8 stig

**Veðrið sunnudagin**
Útsynningur 6 m/s, skýggjað, turt og hitin um 7 stig

**Veðrið mánadagin**
Útsynningur, 7 m/s. Skýggjað, regn og hitin um 10 stig

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 8 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 22 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ





**Veðurvánirnar**
Køld luft við ælaveðri streymar norðanífrá yvir Føroyar. Eitt lágtrýst, 990 hPa yvir Biscaya-víkina fer í ein sunnan, meðan eitt annað lágtrýst, 990 hPa yvir Polen ferðast í ein landnyrðing-norðan. Ein hátrýstsryggur, 1030 hPA beint vestanfyri Ísland ferðast í ein eystan, og nærkast spakuliga Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/10 kl. 06⁰⁰ – 27/10 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 15,0 mm – mált frá 18/10 kl. 06⁰⁰ – 19/10 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 160 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

28. oktober – Tendring
2. novembur – Mánin longst frá jørðini
6. novembur – Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. okt | 7:07 | 19:31 | 6:07 | 18:31 | 6:22 | 18:46 | 9:07 | 21:31 | 10:07 | 22:31 | 5:22 | 17:46 | 4:22 | 16:46 | 7:22 | 19:46 | 8:22 | 20:46 | 6:52 | 19:16 | 8:07 | 20:31 |
| 31. okt | 7:55 | 20:20 | 6:55 | 19:20 | 7:10 | 19:35 | 9:55 | 22:20 | 10:55 | 23:20 | 6:10 | 18:35 | 5:10 | 17:35 | 8:10 | 20:35 | 9:10 | 21:35 | 7:40 | 20:05 | 8:55 | 21:20 |
| 1. nov | 8:45 | 21:11 | 7:45 | 20:11 | 8:00 | 20:26 | 10:45 | 23:11 | 11:45 | - | 7:00 | 19:26 | 6:00 | 18:26 | 9:00 | 21:26 | 10:00 | 22:26 | 8:30 | 20:56 | 9:45 | 22:11 |
| 2. nov | 9:35 | 22:00 | 8:35 | 21:00 | 8:50 | 21:15 | 11:35 | - | 0:11 | 12:35 | 7:50 | 20:15 | 6:50 | 19:15 | 9:50 | 22:15 | 10:50 | 23:15 | 9:20 | 21:45 | 10:35 | 23:00 |
| 3. nov | 10:22 | 22:44 | 9:22 | 21:44 | 9:37 | 21:59 | 0:00 | 12:22 | 1:00 | 13:22 | 8:37 | 20:59 | 7:37 | 19:59 | 10:37 | 22:59 | 11:37 | 23:59 | 10:07 | 22:29 | 11:22 | 23:44 |